TVØROYRAR KOMMUNA

# Størv til Dagstovnin Mýrifípan í Trongisvági

Vit søkja eftir **3 pedagogum** og einum **fysio-** ella **ergoterapeuti** til stuðulstoymið.

Tveir pedagogar fara í farloyvi ávíkavíst ½ og 1 ár.

Tímatalið kann verða frá 20 til 40 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 04.08. 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðssetningurin hjá Stuðulstoyminum er:**
- At stuðla og stimbra børnum við serligum tørvi; primert teimum við tilknýti til Mýrifípuna/Sóljuna
- Vegleiða og ráðgeva um børn við serligum tørvi
- Arbeiða fyribyrgjandi
- Geva fakliga vegleiðing til starvsfólk og foreldur

Vit kunna bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur. Tú hevur eisini møguleika at koma á viðkomandi skeið.

**Vit vænta av tær, at tú:**
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir; skalt samstarva við foreldur, starvsfólk og aðrar fakbólkar
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfólkum
- At tú ert lagalig/ur, vísir gleði og áhuga í starvinum
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum

**Stovnslýsing:**
Mýrifípan er ein dagstovnur hjá Tvøroyrar Kommunu. Her ganga 75 sera fitt børn í aldrinum 0 til 7 ár , og 20 dugnalig starvsfólk. Stovnurin er skipaður í 4 eindir,1 vøggustova, 2 barnagarðsstovur og ein útibarnagarðsstova/ Sóljan til tey elstu børnini.

Í stuðulstoyminum arbeiða í løtuni 2 pedagogar 30 og 35 tímar.

Vit samstarva við Sosialu Deild í Tvøroyrar Kommunu og samstarvskommunurnar, og við aðrar fakbólkar, so sum serráðgeva, heilsufrøðing og talulærara.

Stuðulstoymið er ein eind fyri seg, ið fyrst og fremst tekur sær av børnum við serligum tørvi, harnæst er ráðgevandi og vegleiðandi fyri foreldur og starvsfólk.

**Lønarviðurskiftir:**
Løn sambart sáttmálað millum Føroya Pedagogfelag og Kommunufelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Guðruna Petersen, leiðara tlf.372700

**Umsókn:**
Umsókn, saman við prógvið og viðmælum skulu verða Dagstovninum Mýrifípuni, Smærugøta 8, FO – 826 Trongisvágur, innan 20.juni 2008

**Tvøroyrar kommunu**
800 Tvøroyri




RUNAVÍKAR kommunuskúli
Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

# Lærarastørv í Runavíkar kommunuskúla

Til skúlaárið 2008/09 verður søkt eftir 9 lærarum at byrja 1. august 2008.

- 7 lærarum í tíðaravmarkað fulltíðarstarv skúlaárið 2008/09 fyri lærarar í farloyvi og avlopstímar.
- 2 lærarum í tíðaravmarkað stytri enn eitt ár fyri lærarar í farloyvi

a) eitt starv fulla tíð fyri lærarar í barnsburðarloyvi frá skúlaársbyrjan til u.l. 1. mars 2009.

b) Eitt starv 21 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi til 1. jan 2009.

Søkt verður eftir lærarum, sum kunnu lesa tímar í m.a.

Innskúlingini, miðdeildini, framhaldsdeildini og í serstovunum.

Umsøkjararnir mugu hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinaøkjum: máli, støddfrøði, ítrótti, kunningarlærugreinunum, handaligu lærugreinunum, bókasavn, teldulæru og at arbeiða við næmingum við breki.

**Vit vænta, at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið eru allir skúlarnir, sum hoyra til Runavíkar kommunuskúla. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjamálaráðið og Føroya Lærarafelag. Størvini eru treytað av, at tímajáttanin heldur.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum ummælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 18. juni 2008, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið frá Ásmund Lamhauge, skúlastjóra á tlf. 447331 & 217331 ella Duritu P. Joensen, varaskúlastjóra á tlf. 447331 & 221363.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur komandi skúlaár um 432 næmingar og um 52 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

# Bátamotorur

Vælhildin Volvo Penta
– typa KAD300 – A til sølu.

Sum nýggjur, bert 3 ára gamal og siglt 375 tímar. Hevur 285 HK,

Turbinu og vinkul gear – mrk. HURTH.

Instrumentering fylgir vid – kann síggjast eftir avtalu.

**Um áhugi – ring 229654**

TJÓÐPALLUR FØROYA

## Skrivstovustarv

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Tjóðpall Føroya. Vit kunnu bjóða eitt arbeiðspláss við sál, har hvørt starvsfólk hevur sín týdningamikla leiklut í uppgávuni at geva áskoðarum spennandi og avbjóðandi upplivingar á høgum listarligum stigi.

**Starvið**
Talan er um hálvtíðarstarv við setan frá 1. september 2008 ella skjótast til ber.

**Starvið fevnir í høvuðsheitinum um**
· telefon og postavgreiðsla
· bókhald
· skrivarauppgávur
· annað fyrifallandi arbeiði

**Førleiki**
Best er við skrivstovuútbúgving og -royndum, størst týdning hevur tað tó, at tú:
· hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
· ert stinn/ur í føroyskum
· hevur góð evni at samskifta og samstarva við onnur
· hevur góðan teldukunnleika

**Lønar og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og lønt samsvarandi 3. flokki.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jenny C. Petersen, stjóra, á tel. 228086 ella á grima@post.olivant.fo

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum, cv og møguligum viðmælum skulu vera Tjóðpallinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni 2008.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Tjóðpall Føroya**
Tórsgøtu 9
Postrúm 212
110 Tórshavn



# Familjubátur til sølu

VIKNES 770 Combi til sølu um hóskandi boð er. Byggiár 2002, báturin er sum nýggjur, hevur bert siglt 680 tímar.

Maskina Yanmar 144 HK 2002 – við "slirigear". Báturin hevur VHF, GPS/ekkolodd, radara, bjargingarbát til seks fólk.

Róður inni og úti á dekkinum. Tveir oljutangar á 200 litrar. Borðkrókur og vask. Fýra koyggjupláss. WC við septiktanga og vask.

Báturin hevur hitablásara og er sera vælegnaður – bæði sum familjubátur ella til vinnu. Báturin kann síggjast á uttastu flótibrúnni í Havn.

**Áhugaður keypari er vælkomin at ringja 316510 / 216510**
**Teldupostadr: punta@post.olivant.fo**